tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 31.05.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, ~~Súsanna Bertholdsen~~

Varalimir: Mina Joensen og Eyð Eidesgaard

Ikki møtt: Alvi Mortensen og Súsanna Bertholdsen

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 41/23 | 22/00488-2 | Býráðslimur -Súsanna Bertholdsen- fráboða farloyvi |
| 42/23 | 23/00199-2 | Tvøroyrar Býráð -Skipan samb. Kommunustýrislógini valskeiði 2020-2024 (§6 val av borgarstjóra og §28 val av nevndarlimum til føstu nevndirnar) |
| 43/23 | 20/00364-1 | Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu |
| 44/23 | 23/00154-1 | Tvøroyrar Kommuna -Roknskapur 2022 |
| 45/23 | 23/00060-1 | TB -fótbóltsvøllurin við Stórá skiftan av grasliki 2023 |
| **Til kunningar** | | |
| 13/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 14/23 | 23/00213-2 | KF -Lógaruppskot til hoyringar (Brekumboð) |
| 15/23 | 23/00185-2 | IRF -Ársaðalfundur 2023 |
| 16/23 | 23/00184-3 | SEV -aðalfund 21. apríl 2023, fundarfrágreiðing |
| 17/23 | 23/00117-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2023 |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin og kunnar um at Alvi Mortensen hevur fráboða forfall til býráðsfundin, og at hann ynskir at eyka limur á Lista T, Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 tekur sætið í býráðnum.

Jónhild Midjord Nybo er fyrst valdi eykalimur á Lista T, felagslistanum hevur fróboðað at hon kann ikki møta til fundin og er tí næst valdi eykalimur á Lista T, felagslistanum Mina Joensen boðin at møta fyri Alva Mortensen.

Atkvøtt verður um hvørt Mina Joensen, sum annar varalimur á lista T, Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 kann taka sætið í býráðnum. Hetta er einmælt samtykt.

Kristin Michelsen kunnar um at Súsanna Bertholdsen hevur hin 18. apríl 2023 fráboða farloyvið frá býráðnum.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Eyð Eidesgaard, ið er fyrst (1) valdi varalimurin á lista "C" Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin, eftir at Súsanna Bertholdsen, býráðslimur fyri lista "C" Javnarflokkin hevur fráboða borgarstjóranum, at hon ynskir fyribils farloyvið úr býráðnum.

Atkvøtt verður um hvørt Eyð Eidesgaard, sum fyrsti varalimur á lista C, Javnarflokkinum til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 kann taka sætið í býráðnum. Hetta er einmælt samtykt.

Kristin Michelsen, borgarstjóri boðar frá, at niðanfyri málini verða útsett til næsta býráðsfund:

- Punkt 42/23Tvøroyrar Býráð -Skipan samb. Kommunustýrislógini valskeiði 2020-2024 (§6 val av borgarstjóra og §28 val av nevndarlimum til føstu nevndirnar)

- Punkt 43/23Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu

Einmælt samtykt at taka málini 42/23 og 43/23 av skrá.

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru til skránna –ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 41/23
## 22/00488-2 Býráðslimur -Súsanna Bertholdsen- fráboða farloyvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 41/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Fráboðan um farloyvið frá býráðsarbeiðinum er móttikin frá býráðslimi Súsonnu Bertholdsen, sum í telduposti til borgarstjóran boðar frá at:

- *Í telduposti sendur til borgarstjóran hin 18. apríl 2022 verður fráboðað av Súsonnu Bertholdsen, at hon fer í fyribils farloyvið frá Tvøroyrar Býráð grunda á løgtingsarbeiði.*

Samb. valúrslitinum av kommunuvalinum 10. november 2020, er tað Eyð Eidesgaard, ið er vald sum nr. 4. á listanum hjá javnaðarflokkinum, og harvið 1. tiltakslimur hjá javnaðarflokkinum til býráðið á Tvøroyri, valskeiðið 2021-2024.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

- ***§ 18.*** *Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Er eingin kommunustýrislimur, sum kann seta fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*
    - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
    - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

***§ 19.*** *Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.*

**Viðmerking til grein §18**

*Til § 18:* Starvið sum kommunustýrislimur verður mett sum borgaraskylda. Hetta upprunastøðið er millum annað lógarfest í kommunalu vallógini um skylduna at taka við vali, um ein er valbærur.
Ein kommunustýrislimur hevur sostatt skyldu at røkja starvið í virkiskeiðinum. Hetta merkir í fyrstu syftu, at kommunustýrislimur hevur skyldu at vera á kommunustýrisfundum og á teimum nevndarfundum, har hann er valdur sum nevndarlimur. Hóast kommunustýrislimur hevur møtiskyldu, er hon ikki treytaleys. Hetta sæst eisini í ásetingunum í stk. 1 og 2 um lógligt forfall. Lógin viðger ikki út í æsir, nær talan er um lógligt forfall, og hon tekur heldur ikki støðu til, hvussu langt møtiskyldan røkkur. Heilsustøða er greidliga nevnd bæði í stk. 1 og 2 sum lóglig forfalsorsøk. Hetta merkir, at bæði heilsustøðan hjá kommunustýrisliminum sjálvum eins og heilsustøðan hjá barni hansara, ella øðrum nær skyldum ættfólki, kann volda, at hann hevur lógligt forfall og tískil ikki møtiskyldu.

Í stk. 1 verður eisini onnur orsøk enn heilsustøða nevnd, sum lóglig forfallsorsøk. Grundgevingin fyri hesum er tann, at á fyrsta fundinum og við aðru viðgerð av fíggjarætlanini, verða bindandi framtíðarkarmarnir lagdir fyri kommunalu fyrisitingina. Á hesum fundum hevði tað tí verið serliga óheppi, um politiska javnvágin í kommunustýrinum bleiv avlaga, orsakað av heilsustøðuni hjá einstakum kommunustýrislimi.

At røkja annað starv er sambært stk. 2 somuleiðis ásett sum lóglig forfalsorsøk. Skal ein kommunustýrislimur røkja tvær ella fleiri borgarligar skyldur um sama mundið, kann limurin sjálvur velja, hvat av hesum hann vil røkja.

*Til stk. 1.:* Tiltakslimur kann sambært stk. 1 verða innkallaður, um so er, at kommunustýrislimur ikki kann møta av heilsuávum. At innkalla tiltakslim sambært hesi áseting er sjálvkravt, og tí er ein áheitan um hetta fortreytin fyri, at tiltakslimur kann verða innkallaður.

*Til stk. 2.:* Borgarstjórin hevur hinvegin skyldu til at innkalla tiltakslimin eftir stk. 2, um tað ikki ber kommunustýrislimi til at møta í minsta lagi 14 samfullar dagar. Í tí viðfangi skulu neyðugar upplýsingar og møgulig skjalprógv vera til taks, ið siga, hví og hvussu leingi kommunustýrislimurin væntandi ikki kann røkja starv sítt. Fráveran er at rokna frá teirri løtu, borgarstjórin verður kunnaður um hana, ella frá tí, at sjálv fráveran byrjar.

**Málið um farloyvi verður lagt fyri býráðið til støðutakan samb. kommunustýrislógina §18, har mælt verður til, at Eyð Eidesgaard tekur sæti í býráðnum.**

**Fíggjarligar avleiðingar: ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Einmælt samtykt at Eyð Eidesgaard, sum fyrsti varalimur á lista C, Javnarflokkinum til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 tekur sæti í býráðnum fyri Súsannu Bertholdsen, sum hevur biði um farloyvið.

42/23

**23/00199-2 Tvøroyrar Býráð -Skipan samb. Kommunustýrislógini valskeiði 2020-2024 (§6 val av borgarstjóra og §28 val av nevndarlimum til føstu nevndirnar)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 42/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.05.2023**
Borgarstjórin mælir til at velja nevndirnar av nýggjum, nú býráðslimur –Súsanna Berholdsen- hevur fráboða farloyvið, og ikki fær røkt sítt starv sum býráðslimur í tíðarskeið longi enn 14 samfullar dagar.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

- ***§ 18.*** *Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Er eingin kommunustýrislimur, sum kann seta fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*
  - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
  - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

***§ 19.*** *Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.*

**§28 NEVNDIR**

- ***§ 28.*** *Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.*
  - *Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.*
  - *Stk. 3. Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.*
  - *Stk. 4. Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.*

## Kommunustýrisskipan hjá Tvøroyrar Kommunu dagf. 20. Apríl.2021, samtykt á býráðsfundi 24. Apríl 2021.

- **§ 8, 4. petti.** Tað er valbólkurin, sum avgerð, hvør tekur sæti í nevndum, antin valdur- ella eykavaldur kommunustýrislimur, tá fasti limurin og varalimurin hava forfall.
- **§20 , 1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:
  - Sosiala nevnd
  - Tekniska nevnd
  - Mentanarnevnd
  - Vinnu- og havnanevnd
  - Trivnaðar- og umhvørvisnevnd

**Tilmælið kommunustjórin 01. mai. 2023 val av §28 nevndum og umboðum í §30 nevnd BHS Bú- og heimatænastuna.**

1. **Kommunustjórin mælir býráðnum at boða frá valbólkum.**

- Sambært § 3 í kommunustýrislógini er ásett, við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

2. **Kommunustjórin mælir býráðnum velja umboð í fíggjarnevndina-** veljast skullu 2 limir og 3 tiltakslimum -(borgarstjórin er føddur formaður í nevndini) (Lutfalsval).
   - **§ 38.** Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

3. **Kommunustjórin mælir býráðnum velja 3 limir og 3 tiltakslimir í:**
   - Sosilaunevnd
   - Teknisku nevnd
   - Mentanarnevndina
   - Vinnu og havnanevndina
   - Trivnaðar og umhvørvisnevndina

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 31. maj 2023:</u>**
Málið tikið av skrá.

**43/23**
**20/00364-1 Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 31.05.2023 | 43/23 |

Tilmæli: Samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 6. Partur "Aðrar nevndir" skulu veljast nevndarlimir í: *-limir vera valdir við lutfallsvalið-*

- §30 Skattakærunevndina fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 varalimir
- §31 Barnaverndarnevndina, 1 limur og 1 varalimur
- §32 Tilbúgvingarnevndin, borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran valdir 2 limir og 3 varalimir.
- §33 Ferðslunevndin –somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 varaumboð fyri koyrilærarnar.
- §34 Stk.1 Skúlastýrið, 2 limir og 2 varalimir
  - Stk.2 Kommunufelagið Borgarstjórin er føddur limur
  - Stk.3 Suðuroyar ferðavinnufelag, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.4 Valnevndin, 5 limir og 5 varalimir
  - Stk.5 Musikkskúlin fyri Suðuroy, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.6 Snaran, 2 limir og 2 varalimir
  - Stk.7 Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.8 Umboð í IRF, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.9 Umboð í SEV, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.10 Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.11 Suðuroyar Bú- og Heimatænastu, Borgarstjórin er føddur limur, og umframt verður valdur 1 limur og 1 varalimur

**Skipan av valbólkum:**
- **Valbólkur A**: Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen
- **Valbólkur B:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg J. Bech

**Kommunustjórin 11.01.2021**

**Barnaverndin:**

- *Eftir at Tvøroyrar býráð samtylti 4. januar 2021, at velja Barbaru Gram sum fastan lim, og varalimur Heidi Bech, sum vara lim í barnaverndina, hevur Barbara Gram fráboða, at hon ynskir ikki at halda fram í nevndini fyri barnaverndina.*

Tilmæli er at velja 1. fastan lim, og ein varalim í barnaverndina, sum umboð fyri Tvøroyrar kommunu.

**Føroya Eftirskúli:**

- Málið var fyri á býráðsfundi 4. januar 2021, man samtykt var at útseta málið til næsta býráðsfund.

**<u>Býráðið 04. januar 2021:</u>**

**Suðuroyar Ellis og Røktarheim:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Einmælt samtykt

**Suðuroyar Musikskúli:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Poul Arni Holm, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Uppskot frá valbólki A: Til fast lim Eyðun Nólsøe, og varalim Póla Arna Holm
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsnna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech.
  Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Einmælt samtykt

**Tvøroyrar Bygda og Sjósavn:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kári Jespersen, og varalimur Chris Jan Michelsen
  Einmælt samtykt

**Skattakærunevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Óluva K. Mortensen, varalimur Eyðbjørg Midjord og fastan lim Frígerð Mortensen, og varalimur Hanna Nielsen
  Alvi Mortensen trekkir seg í hesum málinum vegna gegni, og Jónhild M. Nybo tekur sætið.
  Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Jens Johannesen og vara limur Hallur í Heiðinum
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsnna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónhild Midjord Nybo og Jónleyg J. Bech. Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Einmælt samtykt

**Barnaverndartænastan: (Stýrið)**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Jónleyg J. Bech, og varalimur Anita Vibergsdóttu
  Einmælt samtykt

**Barnaverndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Barbara Gram, og varalimur Heidi Bech
  Einmælt samtykt

**Suðuroyar Bú og Heimatæansta:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristinn Michelsen føddur limur, varalimur Anita Vibergsdóttur, og fastan lim Jónleyg J. Bech, varalimur Anita Vibergsdóttur
  Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Súsanna Bertholdsen og varalimur Kristina Roest
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech.
  Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech, harvið er uppskot B samtykt.

**Skúlastýrið:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
- Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Bjarna Hammer og varalimur Súsanna Bertholdsen
  Einmælt samtykt

**Skjalasavnið:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Anita Vibergsdóttur, og varalimur Jónleyg J. Bech
  Einmælt samtykt

Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest valdi at fara av fundinum, kl. 19:40.

**Føroya Eftirskúli:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Til fastan lim er Rasmus Rasmussen, og varalimur Ólavur Rasmussen
  Til fastan lim er Jónhild Nybo, og varalimur Mina Joensen
  Uppskot frá Kristin Michelsen var at útseta hetta mál. Fyri at flyta málið til ein seinni fund er einmælt samtykt

**IRF:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Anita Vibergsdóttur, varalimur Kristin Michelsen
  Einmælt samtykt

**SEV:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Einmælt samtykt

**Valnevnd:** Uppskot frá valbólki B:

- Jean Dimon, varalimur Otto Gram
- Mariann Mikkjalsdóttur, varalimur Mina Joensen

- Armgarð Sørensen, varalimur Ronald Robertsson

Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Jonhild Andreasen og varalimur Malla Dam, og Diana Heinesen varalimur Annika Eidesgaard.

Einmælt samtykt

**Brunanevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur Fastan lim Alvi Mortensen, varalimur Jónleyg J. Bech
- Uppskot frá valbólki A: Til fastan lim er Bjarni Hammer fastur limur og vara limur Súsanna Bertholdsen
- Átaksleiðarin Annfinn Hammerfoss Leo, varalimur Jón Einarsson
- Hvalbiar kommuna, fastan lim umframt varalim
- Fámjins kommuna fastan lim umframt varalim
- Suðuroyar norðara Bjargingarfelag fastan lim umframt varalim
- Sýslumaðurin í Suðri.
  Einmælt samtykt

**Ferðslunevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, varalimur Jónleyg J. Bech, og fastan lim Anita Vibergsdóttur, varalimur Jónleyg J. Bech
- Uppskot frá valbólkin A: Til fastan lim er Kristina Roest og varalimur er Bjarni Hammer
- Politiið í Suðri
- Umboð fyri koyrilærarnar Alvi Mortensen, varalimur Áki Dimon.
  Einmælt samtykt

## Kommunustjórin 30.05.2023:

Borgarstjórin mælir til at velja nevndirnar "§34 Aðrar nevndir" av nýggjum, nú býráðslimur –Súsanna Berholdsen- hevur fráboða farloyvið, og ikki fær røkt sítt starv sum býráðslimur í tíðarskeið longi enn 14 samfullar dagar. -limir vera valdir við lutfallsvalið-

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

- ***§ 18.*** *Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Er eingin kommunustýrislimur, sum kann seta fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*
  - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
  - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

***§ 19.*** *Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.*

§35 Aðrar nevndir

*§ 35. Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tilíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3. Stk. 2. Skal ein nevnd ella tilíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum. Stk. 3. Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella onnur, til annað slag av sessum er sett.*

**Kommunustýrisskipan hjá Tvøroyrar Kommunu dagf. 20. Apríl. 2021, samtykt á býráðsfundi 24. Apríl 2021.**

- **§ 8, <u>4. petti.</u>** Tað er valbólkurin, sum avgerð, hvør tekur sæti í nevndum, antin valdur- ella eykavaldur kommunustýrislimur, tá fasti limurin og varalimurin hava forfall.
- **§30 , 1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:

  - §30 Skattakærunevndina fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 varalimir
  - §31 Barnaverndarnevndina, 1 limur og 1 varalimur
  - §32 Tilbúgvingarnevndin, borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran valdir 2 limir og 3 varalimir.
  - §33 Ferðslunevndin –somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 varaumboð fyri koyrilærarnar.
  - §34
    - Stk.1 Skúlastýrið, 2 limir og 2 varalimir
    - Stk.2 Kommunufelagið Borgarstjórin er føddur limur
    - Stk.3 Suðuroyar ferðavinnufelag, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.4 Valnevndin, 5 limir og 5 varalimir
    - Stk.5 Musikkskúlin fyri Suðuroy, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.6 Snaran, 2 limir og 2 varalimir
    - Stk.7 Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.8 Umboð í IRF, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.9 Umboð í SEV, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.10 Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.11 Suðuroyar Bú- og Heimatænastu, Borgarstjórin er føddur limur, og umframt verður valdur 1 limur og 1 varalimur

**<u>Tilmælið kommunustjórin 30. mai. 2023 val av §35 aðrar nevndir</u>**

- Mælt verður til at annar limur verður valdur í sessirnir, ið Súsanna Bertoldsen hevur sæti í.
  - Súsanna Bertholdsen er nevndarlimur í:
    - Skúlastýrinum, sum varalimur fyri Bjarna Hammer
    - Brunanevndin, sum varalimur fyri Bjarna Hammer

- Mælt verður eisini til at velja umboð í §30 nevndina BHS Bú- og heimatænastuna av nýggum.
  - Veljast skal 1 limur og 2 tiltakslimir við lutfallsvalið
  - Borgarstjórin er føddur formaður í nevndina

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 31. maj 2023:</u>**
Málið tikið av skrá.

**44/23**
**23/00154-1 Tvøroyrar Kommuna -Roknskapur 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 28/23 |
| 2 Býráðið | 31.05.2023 | 44/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.05.2022**
Borgarstjórin, fíggjarleiðarin, tekniski leiðarin og kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2022, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verður roknskapur og grannskoðanarprotokoll hervið løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

**Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara fyri ár 2023.** Greinin er soljóðandi
*"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".*

**Frágreiðing um grannskoðanina**

**Niðurstøða av framdu grannskoðanini – grannskoðanarátekning**
5 Grannskoðanin av ársfrásøgnini hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Um so er, at kommunustýrið góðkennir ársroknskapin í verandi líki, geva vit honum eina grannskoðanar- átekning uttan tillagingar og áherðslur.

Harumframt hava vit í samsvari við § 10, stk. 7, í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl. kannað eftir, at upplýstu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi, og hava vit gjørt eina átekning uttan vissu í hesum sambandi.

6. Grannskoðanin er farin fram í apríl 2023. Allir postar eru gjøgnumgingnir.

**Samanbering av roknskapi við fíggjarætlan og fíggjarliga gongdin**
Í sambandi við grannskoðanina er hugt eftir gongdini í bæði rakstri og løgum í 2022. Niðanfyri er ein talva, sum líkist høvuðsyvirlitinum í ársroknskapinum, sum vísir nettogongdina í 2022. Tølini í talvuni niðanfyri eru nettotøl og ikki bruttotøl.

Í fíggjarætlanini fyri 2022 varð roknað við einum halli á 30.377 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.377 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 27.000 tkr. Netto gevur hetta 30.377 tkr.

Ársroknskapurin vísir eitt realisera hall á 2.303 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 28.074 tkr. Niðanfyri er útgreining av, hvussu hesin munur er nýttur:

**Broytingin er nýtt soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld | -3.777 |
| Broyting í lániskuld | -297 |
| Broyting í gjaldføri | -24.000 |
| | -28.074 |

**Játtan og nýtsla:**
Vísandi til høvuðsyvirlitið í ársroknskapinum fyri 2022 hjá Tvøroyrar kommunu og yvirlitið omanfyri, er nettomeirnýtsla staðfest á einari grein. Flestu greinir hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er staðfest í Almanna- og heilsumálum. Talan er um 5 tkr. Í løgunum er meirnýtsla staðfest á einari grein, Undirvísing. Staðfest er tó samstundis, at um hugt verður eftir rakstur og løgum fyri greinina netto, so er ikki meirnýtsla. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 10.114 tkr.

*Vart verður gjørt við, at um peningur skal nýtast út yvir játtan, so skal hetta viðgerast av fíggjarnevnd og býráði, áðrenn peningurin verður brúktur.*

**Fíggjarliga gongdin:**
Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2022 76.250 tkr., og er nakað hægri enn undanfarna ár, tá hann var 72.581 tkr. Hækkingin er á 5,1%. Inntøkurnar hjá kommununi eru á 96.853 tkr. og eru nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru 91.366 tkr. Hækkingin er á 6,0%. Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt 22.907 tkr. í 2022 samanborið við 17.819 tkr. í 2021. Størstu løgurnar hava verið gjørdar á hesum økjunum: Fólkaskúlin 2.468 tkr., Umsiting og røkt av fastognum 1.217 tkr., Vegir 7.672 tkr., sløkkiliðið 1.255 tkr., Tvøroyrar havn 1.147 tkr. og bátahavnin 4.087 tkr.

**Samlað skuld í mun til álíkning:**
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| | 2022 | 2021 | 202 0 | 201 9 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoskuld ultimo (tkr.) | -38.153 | -35.850 | -36.815 | -40.541 | -20.053 |
| Álíknaður skatt umr. 23 % | 78.379 | 74.796 | 72.159 | 66.220 | 66.762 |
| Svarandi til álíkning | 0,49 | -0,48 | -0,51 | -0,61 | -0,30 |

*(Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 eru reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soeiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tl, sum kommunan fær afturborið fyri eldraøkið. Endaliga vegleiðingin um akkurát hvat skal nýtast er tó ikki komin enn)*

**Skattainntøkur**
Skattainntøkurnar eru gjøgnumgingnar, og tær samsvara við uppgerð frá Føroya Gjaldstovu. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 74.256 | 70.020 | 68.315 | 67.023 | 68.056 |
| Ætlan | 65.581 | 64.380 | 61.572 | 66.119 | 56.568 |
| Munur | 8.675 | 5.640 | 6.743 | 904 | 11.488 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattaprosent | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 21,90% | 21,90% |
| | | | | | |
| Manntal | 1.767 | 1.771 | 1.747 | 1.714 | 1.715 |
| Inntøka pr. fólk | 42 | 39,5 | 39,1 | 39,1 | 39,7 |
| | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | 355.292 | 335.024 | 326.866 | 306.041 | 310.757 |
| Inntøka pr. fólk | 201 | 189 | 187 | 179 | 181 |
| Broyting í árinum | 6,29% | 1,11% | 4,79% | -1,46% | 5,72% |

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018, §38, at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjar- og rakstrarætlan fyri Tvøroyrar kommunu

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at samtykkja roknskapin fyri 2022 sum fyriliggjandi og beinur málið í býráðið.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Einmælt samtykt roknskapin fyri 2022, og einmælt samtykt at velja aftur løggilda grannskoðaravirkið Januar til grandskoðara fyri Tvøroyrar Kommunu.

**45/23**
**23/00060-1 TB -fótbóltsvøllurin við Stórá skiftan av graslíki 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 12/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 9/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 9/23 |
| 4 Mentanarnevndin | 16.03.2023 | 34/23 |
| 5 Tekniska nevnd | 22.05.2023 | 28/23 |
| 6 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 31/23 |
| 7 Býráðið | 31.05.2023 | 45/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.02.2023**
Form. í Tvøroyrar Bóltfelag hevur sent Tvøroyrar Kommunu skriv við áheitan og ynskið um at graslíki á vøllunum við Stórá verður skift vegna slit og ábøtur verða gjørdar fyri at avvatna vøllin betri, ið er sera vátur á norðari hálvsíðu.

Form. í TB vísir á í skrivi, at ynskið hjá felagnum er at nýtt graslíli frá sama veitara verður álagt. Umsitingin hevur hin 26. Okt. 2022 –saman við form. í TB- havt ástaðis fund við veitaran, ið hevur veitt gamla graslíki.

**Tilmæli hjá umsitingini er at:**

1. *Skifta graslíki, til vøll har korkgranulat verður ífylla. (verandi vølli hevur gummigranulat sum ífylla) –tilboð er umbiði.
    a. *Mæt verður til at áleggja graslíki frá framleiðaranum DOMO sports grass av merkinum Domo Varioslide S Pro. Tað serstaka við hesum slagnum av graslíki er, at tað er framleitt til føroysk viðurskifti. Hæddin á grasstránum er 5,5 cm, sum er væl hægri enn vanligt, og tá trýst verður lagt á graslíkið frá einum bólti ella føti og fer av aftur, so rættir strái seg upp aftur beinanvegin.*
    b. *Talan er um umhvørvisvinarliga loysn, har kork verður fylla, heldur enn gomlu loysnina, har flest allir vøllir í Føroyum hava gummigranulat sum fyllu. Gummigranulat er sera dálkandi, og er ein stór orsøk til nógv mikroplast í náttúruni, og er skaðiligt bæði fyri fólk, djór og lívmargfeldið.*
2. Mett verður at verandi "shockpad" kann endurbrúkast. (sæst tá vøllurin er avtikin)
3. Neyðugt er at fremja betri avvatning av vøllinum. (Umsitingin samskiftir við ráðgeva)
    a. Stór óvissa er um kostnaðin at betra um avvatning.

*Kommunustjórin hevur í hesum sama sambandi heitt á veitaran, um eisini at lata inn serstakt tilboð uppá útskiftan av graslíki á lítla FIFA sparlkivøllinum við Skúlan í Trongisvági. Graslíki við skúlan er sera dálkandi og sliti. Mælt verður til at útskifta til umhvørvisvinarligt graslíki við kork sum ífyllu.

***Samb. heimasíðuni hjá DBU:**

*7. sep. 2022, Kunstgræsbaner i hele Europa skal ikke længere være fyldt med gummigranulat. I hvert fald hvis det står til EU-kommissionen, der netop er kommet med et forslag om et totalforbud mod gummigranulat på alle europæiske kunstgræsbaner.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett eru kr. 4.0 mió á FÆ2023, §537 -Kostnaðurin av graslíki og áleggjan er kendur samb. tilboð, meðan kostnaðurin av avvatning er ókendur

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá DOMO sports grass av graslíkivølli av merkinum Domo Varioslide S Pro fyri ein kostnað á kr. 3.988.000,- vísandi til tilboð dagf. 13.02.2023. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og at heimila tekninsku deild at samskipa arbeiði at skifta vøllin, samt at samskifta við veitara, at betra um avvatning av vøllinum –málið verður beint í býráði

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Mentanarnevndin 16. marts 2023:**
Málið var kunnað.

**Kommunustjórin 21.05.2023:**
Tekniska umsiting hevur *–eftir at graslíki er avtikið við Stórá-* framt royndir og yvirvaking av avvatningini av vøllinum við Stórá. Staðfestast kann, at regnvatni setur skjótari av vøllinum millum miðuna og suðursíðuna, enn millum miðuna og norðursíðina.

Ástaðisfundur var við Stórá 19. mai, har umboð fyri Articon, (Torleif Waagstein) form. í TB, (André Dalfoss) borgarstjórin, og kommunustjórin, teknisku deild Dan Thomsen og Bárður Hentzé metti um støðuna og hvat skal/kann/má gerast fyri at betra um avvatningina. Niðurstøðan var, at tað d.d. ikki fyriliggur nøkur eksakt loysn, sum fyri vissu kann sigast verða tann rætta og bøta um støðuna. Veitarin av graslíki –sum luttók á fundinum umvegis telefon- upplýsir, at umráðandi er, at vøllurin avvatnar væl, og

meira tídningarmikið nú kork verðu fylla í nýggja vøllinum. (kort hevur hægri flotevni enn gummgranulat, og kann tí lættari flyta seg við vatninum) Articon upplýsir, at tilfar, sum drenar væl, hevur verri bleytari ivirflatu, verri berievnir og verri fastleika, sum sannlíkt ávirkar vøllin neiligt viðv. berievni og jaligt við avvatning.

**Møguleikar:**

1. Onki gerða við undirlagi, tvs. leggja nýtt graslíki á verandi undirlag og góðtaka at vøllurin til tíðir kann/er vátari á norðari hálvu enn á sunnari hálvu.
    a. Hetta er tann skjótasta loysnin og viðførur at játtanin heldur.
    b. (Ongin meirkostnaður)
    c. Tíðarætlanin heldur

2. Burturbeina alt undirlag av vøllinum, og áleggja nýtt.
    a. Henda loysninin tekur tíð og er tann mest kost mikla loysnin. Ongin av involverandi aktørum í verkætalani kann tó geva vissu fyri at hetta er tann rættasta loysnin at fremja, og at henda losynin tryggjar nøktandi avvatning.
    b. Um henda loysnin verður vald, verður tó mælt til av Articon, og TD, at onki hall verður á vøllinum –verandi hall er áleið 7,5‰
    c. Samb. Articon og IdeMøblar verða nú flest allir vøllir álagdir uttan hall, (m.a. Tórsvøllur, Gøtu, Argir, Hoyvik...) Metingin av Articon og TD er, at avvatningin riggar betri á sløttum vølli –(hetta sjálvsagt treyta av, at undirlendi er væl drenandi). Hugsanin er, at vatni finnur veg niður ígjøgnum graslíki, og gjøgnum tilgjørdu avvatningarholini í graslíkinum. Hugsanin er, at –á vølli við halli- rennur partur av regnvatni framvið tilgjørdu avvatningarholini, ið eru í graslíkinum og út til síðulinguna, har tað møguliga kann savnast í hyljar.
    d. Meirkostnaðurin av at burturbeina alla yvirflatuna og slætta vøllin er ókent. Men samb. Articon kemur hetta at takka tíð og kosta fleiri mió...
    e. Tíðarætlanin fyri loysn 2 er óviss, men samb. Articon verður arbeiði at strekkja seg væl longri enn til jóansøku. Articon tekur fyrivarni fyri, at mangul er uppá útbúnað, sum kann fremja hesa ætlanin. Men sagt verðu, at hetta letur seg gerða, um ynskið er at fremja hesa ætlan.

3. Alternativa loysnin er, at varveita undirlagi á sunnari hálvu, sum sýnist at drena væl, og «bert» burturbeina part av undirlagnum millum miðuna og norðursíðuna, og har, áleggja nýtt 0-32 drentilfar á ístaðin. Halli á vøllinum verandi tá tað sama.
    a. Henda loysn tekur nakað av tíð, men mett verður at hetta kann gerðast innan fyri ásettu tíðarætlan. Tvs. spælast kann aftur á Jóansøku.
    b. Hvørt henda loysnin betrar um avvatningina kann ongin geva vissu fyri, men fakta er, at 0-32 tilfar drenar betri enn verandi 0-8 tilfar.

**Tekniska nevnd 22. maj 2023:**
Nevndin mælir til at velja loysn nr. 3, har einans tað tilfarið ið ikki drenar væl, verður tikið burtur. Tekniska nevnd hevur onga játtan til endamálið, og málið sum heild er heimhoyrandi í Mentanarnevndini. Men arbeiðið hevur skund, og málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd og fíggja møguligan meirkostnað við eykajáttan. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku- og fíggjarnevndini og at møguligur meirkostnaður verður fíggjaður við eykajáttan.

**Til kunningar**

**<u>13/23</u>**
**<u>23/00044-1 Skattatøl 2023</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 20. februar 2023:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Býráðið 20. februar 2023:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**14/23**
**23/00213-2 KF -Lógaruppskot til hoyringar (Brekumboð)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 14/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.05.2023**
KF Kommunufelagið hevur sent lógaruppskot til hoyringar.

Viðmerkingar hjá KF:

Viðvíkjandi uppskotinum kann viðmerkjast, at ætlaða Brekumboðið fer at kunna úttala seg um yvirskipaði viðurskifti í kommunala geiranum, t.d. sosial-, bústaðar-, figgjarlig-, heilsu-, útbúgvingar-, arbeiðs-, og mentanarlig viðurskifti, umframt atkomu í breiðastu merking.

Fyri Brekumboðið verður skipað ein nevnd við fimm limum – "*... ein umboðandi áhugafeløg á brekøkinum, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og tveir umboðandi almanna-, heilsu-, skúla-, dagstovna- og eldraøkið og frítíðarvirksemi.*"
Kommunurnar eru (millum mangt annað) næststørsti arbeiðsgevari í Føroyum, umsita dagstovna- og eldraøkið, hava nógv borgarasamskifti og standa fyri stórum parti av tí bygging, ið so ella so er ætlað almennari nýtslu. Tí kann tað vera hóskiligt at kommunurnar hava fast umboð í nevndini fyri Brekumboðið.

Lógaruppskotið leggur somuleiðis upp til, at allir tilnevnandi partar helst skulu tilnevna fýra fólk, sum tey meta skikkaði at umboða teirra øki. Í hesum sambandi skal fyri hvønn einstakan lýsast "*... útbúgving, førleikar og viðkomandi royndir [...], eins og í hvønn mun tey, ið mælt verður til, hava innlit í samfelagslig og fakligi viðurskifti, ið hava týdning fyri nevndarinnar virki.*" Hetta er kann metast at vera ein umsitingarliga tung tilnevningarskipan, serliga hjá smærri/sjálvbodnum felagsskapum.

Skrivstovan hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið. Freistin hjá kommununum at koma við viðmerkingum til okkara er sum nevnt 25. mai 2023 kl. 12.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan/kunning.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**15/23**
**23/00185-2 IRF -Ársaðalfundur 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 15/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.05.2023**
Kunning og fundarfrágreiðing av aðalfundi hjá IRF 28. Apríl 2023.

**Lógargrundarlag: -**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Kunning til býráðið

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**16/23**
**23/00184-3 SEV -aðalfund 21. apríl 2023, fundarfrágreiðing**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 16/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.05.2023**
Kunning og fundarfrágreiðing av aðalfundi hjá SEV 21. Apríl 2023.

**Lógargrundarlag: -**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið: Kunning til býráðið**

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**17/23**
**23/00117-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 24/23 |
| 2 Býráðið | 31.05.2023 | 17/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.03.2022**
Við hesum verður boðað limunum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá, at ársfundur verður fríggjadagin hin 28. apríl 2023 í Auditorinum í Smæruni, J. H. Schrøtersgøtu 7 í Havn frá kl. 09.30 til kl 14.00.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 18. apríl kl 12.00

**Lógargrundarlag:**
*- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)*
*- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin. (§6)*
*- Til ársfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin. (§4)*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt at Bjarni Hammer umboðar Tvøroyrar Kommunu.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 17:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Mina Joensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Eidesgaard